# Ársins fyrsti føroyingur

**Nýggjársmorgun klokkan 8.40 sá fyrsti føroyingur í 2004 dagsins ljós á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Ein vælskaptur drongur uppá 3.800 gram. Foreldrini eru Barbara Biskopstø og Leivur Thorsteinsson úr Klaksvík**



*Barbara Biskopstø við nýfødda soninum eitt gott samdøgur eftir, at hann kom í verðina*

FØÐING

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Triðja árið á rað sá ársins fyrsti føroyingur dagsins ljós á Klaksvíkar sjúkrahúsi. Ein fittur drongur upp á 3.800 gram og 52 cm.

– Galið, tað er stuttligt at fáa eitt barn. Eg hevði als ikki ímyndað mær, at tað fór at verða soleiðis. Tað er ótrúligt at hyggja at honum og hugsa sær, at vit eiga hann. Eg havi fleiri yngri systkin, so eg eri ikki ókend við børn, men tað er nakað heilt serstakt, tí hendan eigi eg, sigur stolta mamman, sum er komin væl fyri seg eftir føðingina og barnsburðin.

Barbara var sett at eiga Tollaksmessudag, men lítlibeiggin gav sær góðar stundir og lat øll bíða í níggju dagar, áðrenn hann vildi koma í verðina. Og samstundis bleiv hann so fyrsti føroyingur í 2004.

– Tað er sjálvandi stuttligt og nakað serstakt, at hann er tann fyrsti nýføðingurin í ár, men vit eru bara glað fyri, at hann er komin í øllum góðum, sigur Barbara.

### Fýrverkið setti ígongd

Barbara sigur, at hon als ikki hevði væntað, at nakað fór at henda fyrsta dagin á árinum. Tí á midnátt stóð hon saman við familju og vinum skeyt nýggja árið inn. Hon føldi onki til verkir, og har var onki, sum týddi uppá, at barnið fór at koma. Hon var annars byrjað at ótolnast av álvara, tí hon hevði gingið meira enn eina viku yvir.

– Har vóru bæði rakettir og bombur, og eg bleiv kløkk av hvøllu brestunum nakrar ferðir, so tað hevur riggað, sigur hon skemtandi.

– Tað endaði so í øllum førum við einum ordiligum bresti, og hetta er tann størsta nýggjársgávan, sum ein yvirhøvur kann fáa, sigur hon og hyggur eymliga at soninum, sum liggur í fasta svøvni í føvningingum hjá mammu síni.

Barbara er í læru sum grafikari, og Leivur siglir við Norðborg, men hann verður heima í eina tíð nú. Barbara fer í farloyvi og gleðir seg at sleppa heim við beiggjanum.

– Men fyrst og fremst vil eg liggja her á sjúkrahúsinum í nakrar dagar og taka tað róligt, sigur hon.

Lítlibeiggin hevur tað gott, har hann liggur hjá mammu síni og svevur í sama lag, og líka leggur hann í hendan heiðurin og hóvastákið, sum verður gjørt burturúr, at hann er ársins fyrsti føroyingur.




frá sunnudegi til hósdag í januar

Rio Bravo Restaurant

Two for one

Bóndasteak
Enskur búffur
Franskur búffur
Tournedos
Hawaii-steak
T-bone steak
Piparbúffur
Rio Bravo steak

Eigaraskifti....
...og vit bjóða:

Etið tvey
gjaldi fyri ein!

Galdandi fyri allar
nevndu búffar og steaks!

Vælgagnist og gott nýggjár!

Ikki galdandi fyri
mat-út-úr-húsinum!

Two for one
Rio Bravo Restaurant
Borðbílegging á 319767


# Herverk í Klaksvík

**Onkur herverk og annað smávegis hevur verið í Klaksvík á nýggjárinum, men sum heild var friðarligt**

LØGREGLUTÍÐINDI

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Tvey herverk hava verið á nýggjárinum. Í øðrum førinum var talan um ein, sum breyt eitt spegl á einum bili. Og í hinum førinum var tað ein maður, sum bleiv tveittur út úr klubbanum. Øði kom í hann, og hann breyt ein rút í einum bili.

Løgreglan sigur tó, at í báðum førunum eru gerningsmenninir og bileigararnir komnir ásamdir um at orna tað teirra millum.

Ein bilførari varð tikin fyri rúsdrekka koyring, og eitt rok tók seg upp í býnum, men tað varð steðgað og verður ikki handfarið sum ein harðskapssak.

Annars sigur løgreglan í Klaksvík, at tað hevur ikki verið ófriðarligt á nýggjárinum. Og tað hava ikki verið stórvegis trupulleikar av fýrverki.

Fyri uttan eina fráboðan um eina skrellispann, sum varð sprongd í luftina, hevur løgreglan onga skaðafráboðan fingið orsakað av fýrverki.




Gott nýggjár, allir føroyingar

Eg eri til dystin fús at arbeiða
fyri framtíð Føroya
fyri stabiliteti og tryggleika í Føroyum
fyri einum sterkum javnaðarflokki

HELENA DAM Á NEYSTABØ
helena.fo





Okkum øllum tørvar C vitaminir



JAVNAÐARFLOKKURIN
- nakað fyri C